# Eysturskúlin rundan føðingardag

*31. august eru 20 ár síðani, at størsti skúlin í Føroyum varð vígdur, og í hesum sambandi hevur skúlin skipað fyri ymiskum tiltøkum*



*Næmingarnir á Eysturskúlanum mynda eitt tjaldur á 20 ára degnum fyri vígsluni av skúlanum. Myndin er tikin úr stiganum á brandbilinum*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

Stefan í Skorini

Børnini møttu klokkan 9 á morgni, og so varð ringur sligin í teimum trimum lonunum í Eysturskúlanum. Dansað varð so eftir gongini til øll vórðu savnað í skúlahøllini, og har dansaðu so øll saman. Flóvin Bænadiktson varð kvøðin.

Nógv varð sungið hendan dagin, og í skúlahøllini hevði hvør flokkur yrkt eitt ørindi um skúlan, sum tey sungu fyri hinum. Øll tóku síðani undir í niðurlagnum.

Lærararnir høvdu eisini fyrireikað sítt til hetta høvið, og í skúlahøllini framførdu teir ein sjónleik fyri næmingunum.

Síðani varð farið út um, og á vøllinum, sum er beint við Eysturskúlan, skuldu næmingarnir mynda tjóðfugl okkara, tjaldrið. Næmingarnir hava fingið eina T-shirt í part, so at litirnir skuldu vera teir røttu. Allir næmingarnir stillaðu seg soleiðis, at teir myndaðu eitt stórt tjaldur, sum sæst á myndini. Brandbilurin var á staðnum, og myndin er tikin úr stiganum hjá hjá brandbilinum.

Aftaná fóru næmingar og lærarar omanaftur í skúlan, har borðreitt varð við heimabakaðum kakao og bollum, sum lærararnir høvdu bakað.

Tað eru nú 20 ár síðani, at Eysturskúlin varð vígdur, men longu í 1974 varð fyrsti parturin av skúlanum tikin í nýtslu. Allur skúlin var tó ikki liðugt gjørdur fyrr enn í 1980 og síðani vígdur.

Eysturskúlin er størsti og næmingaríkasti skúlin í Føroyum. Í løtuni hava 570 næmingar sína dagligu gongd á skúlanum, og teir kunnu nú hátíðarhalda 20 ára dagin saman við lærarunum. Næmingarnir fegnast kanska meira um, at teir sleppa undan undirvísing ein dag.

# Fór á land sunnanfyri Borá

*Ein bátur, sum hevði verið eftir havhestaungum, sigldi ov nær og fór á land, men allir komu heilskapaðir frá hendingini*

Stefan í Skorini

Um hálvgum fýra tíðina mikudagin varnaðust menn umborð á Tróndi, at ein báturur var farin á land beint sunnanfyri Borá, sum er millum Glyvursnes og Kirkjubønes.

Teir umborð á Tróndi vóru fyrst hjá bátinum og varskógvaðu aðrar smábátar, sum vóru har um leiðir, og nakrir komu teimum skjótt til hjálpar. Bátur varð eisini settur út av Tróndi, tí skipið kundi ikki fara so nær. Menninir vórðu tiknir upp, og eingin fekk mein av óhappinum.

Báturin, sum fór á land, hevði kós móti Havnini, og onkur av smábátunum tók menninar við sær til Havnar. Báturin var illa farin og er nú tikin av aftur. Tróndur helt leiðina fram úr Havn til Skopunar.



# Onnur skipasmiðja gera skrokkin lidnan

*Skipasmiðjan í Gdansk skal lata Skála Skipasmiðju skipið 5. oktober. 1. januar skal nýggja sandoyarferjan setast í sigling*

Eirikur Lindenskov

Illa hevur gingist í hond hjá Skipasmiðjuni á Skála at fáa skrokkin til Sandoyarferjuna, sum skuldi byggjast á pólskari skipasmiðju.

Eftir ætlanini skuldi skrokkurin latast føroysku skipasmiðjuni tann 20. apríl í ár, men greitt varð fyrr í ár, at hetta fór ikki at eydnast.

Fyrr hevur Skipasmiðjan á Skála boðað frá, at skrokkurin fór at verða seinkaður, men ikki so nógv, at ferjan ikki kundi latast til tíðina.

Men trupulleikin gjørt størri enn væntað, og nú um dagarnar hava umboð fyri Skipasmiðjuna á Skála, m. a. stjórin, Jón Danielsen og Poul Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju verið í Póllandi, har teir hava tikið skrokkin frá skipasmiðjuni, Stoznia Porta Odra í Stettin og gjørt nýggja sáttmála við skipasmiðjuna Stocznia Remontova í Gdansk, sum skal gera skrokkin lidnan.

Nýggis sáttmálin sigur, at ferjan skal latast skipasmiðjuni á Skála 5. oktober, tá skrokkurin verður sleipaður til Føroya. Arbeiðið skal síðani gerast liðugt til nýggjárs.

Skipasmiðjan á Skála hevur so slakar tríggjar mánaðir at gera skipið liðugt.

Gamli Tróndur, sum varð keyptur gamal til Føroya í 1967, siglir við undantaksloyvi, sum bert er galdandi til 31. desember í ár.

– Skulu vit biðja Skipasýnið um enn eitt undantaksloyvi, so verða vit noyddir at hava haldgóðar grundir. Og vit kunnu ikki gera tað, uttan vit við vissu síggja ein enda á hesum málinum, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni.

Men stjórin á Strandferðsluni er als ikki vísur í, um tað ber til at fáa undantaksloyvi - og um tað ikki ber til, og nýggja ferjan ikki er liðug, so fyriliggur ein nýggj støða, sigur hann.

– So verða vit noydd út á marknaðin at finna eitt hóskandi skip, og tað er ikki so lætt at finna til hasa farleiðina, sigur hann og leggur afturat, at hetta sjálvnadi eisini er ein spurningur um pengar.



*Nýggja sandoyarferjan verður nú gjørd liðug í Gdansk*

Reidar Nónfjall hevur enn ikki fingið onnur boð enn tey, at ferjan verður latin til tíðina, hóast mangt bendir á, at so fer ikki at verða. Men hann hevur biðið um fund við skipasmiðjuna, har hann fer at biða um frágreiðing um málið.

Vit hava fyrr nevnt, at skipasmiðjan verður noydd at rinda dagbøtur, um ferjan ikki verður latin til tíðina. Reidar Nónfjall sigur, at ongar dagbøtur verða rindaðar teir fyrst 90 dagar, ferjan verður seinkað. Men síðan skal skipasmiðjan rinda 5.000 krónur teir næstu 40 dagarnar og síðani 10.000 krónur um dagin.

So tað fer ikki at kosta Skipasmiðjuni á Skála eina krónu, um ferjan ikki verður latin fyrr enn 1. apríl…

# Vit kunnu ikki stavnsbinda fólk

*– Vit hava ikki longur lógarfest monopol, tí var kappingin á sjóvátryggingarøkinum væntandi, sigur Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar*

Eirikur Lindenskov

– Tað var sjálvandi væntandi, at nýggja tryggingarfelagið fer at leggja seg eftir at fáa fólk frá okkum. Tað kunnu vit ikki gera so nógv við - og vit kunna ikki stavnsbinda fólk.

Hetta sigur Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, tá Sosialurin bað hann um eina viðmerking til, at Páll Kunoy, stjóri á sjóvátryggingardeildini hjá Tryggingarferðalagnum Føroyar er farin í starv sum deildarstjóri á sjóvátryggingardeildini hjá Trygd.




*Gunnar í Liða, forstjóri og Mortan Poulsen, stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar*

– Vit hava ikki longur lógarfest monopol - og tí eru vit eisini fyrireikaðir upp á kapping, sigur Gunnar í Liða. Hann heldur ikki, at tað er ein stórhending, at teir nú eisini fáa kapping á sjóvátryggingarøkinum.

– Vit hava havt eina ávísa kapping á hesum øki, um vit hugsa um tey altjóðaskrásettu skipini. Men tað er greitt, at nú verður kappingin størri, sigur hann.

– Men boðskapurin hjá okkum er tann sami: Eingin tryggingartakari skal fara frá okkum, tí at hann fær eina bíligari trygging aðrastaðni, sigur Gunnar í Liða, sum leggur afturat, at hetta eisini er galdandi, um teir verða noyddir at fara óforsvarliga langt niður í prísi.

Men eisini hann lovar, at skilið ikki verður so ringt, sum við bilatryggingunum - og hann ætlar sær ikki út í eitt tílíkt prískríggj.

– Eg haldi, at báðir partar hava lært av biltryggingunum, sigur forstjórin hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

– Um prísirnir nú eru komnir í fasta legu, ella um vit kunnu vænta fleiri hækkingar, veit hann ikki um at siga, tí hetta veldst um skaðaprosentið - sum nú er alt ov stórt,sigur Gunnar í Liða.

# Dagligur leiðari í Sjónleikarhúsinum

Hesi seinastu árini hevur Havnar Sjónleikarfelag verið sera virkið. Umframt fleiri leikuppsetanir á hvørjum ári, gevur Sjónleikarhúsið nógvum øðrum og fjølbroyttum tiltøkum innivist, umframt at hýsa sjónleikarskúla fyri børnum og øðrum skeiðvirksemi. - At leggja til rættis og samskipa øll hesi tiltøk er sera orku- og tíðarkrevjandi, og hjá nevndini, sum øll hesi árini hevur tikið sær av hesum arbeiði, hevur tørvurin á einum dagligum leiðara leingi verið eyðsýndur. Tí hevur nevndin nú gjørt av at seta eitt fólk at taka sær av hesum burturav.

Í dag byrjar Birita Krossteig í starvi sum dagligur leiðari hjá Havnar Sjónleikarfelag, og í hesum sambandi verður móttøka í Sjónleikarhúsinum í dag frá klokkan 14-16. Øll eru hjartaliga vælkomin, verður heilsa úr Sjónleikarhúsinum.

